## Aðalorðaskifti

Ta næstu vikuna verða tvey aðalorðaskifti í Løgtinginum. Í dag hevur Jógvan á Lakjuni, landsstýrismaður, lagt mál um aðalorðaskifti um fólkaskúlan fyri Løgtingið, og frammanundan er avgjørt, at sjálvt orðaskiftið verður týsdagin í næstu viku. Tá fer Bjarni Djurholm, landsstýrismaður, at leggja fram frágreiðing um orkupolitikk. Hon skal eisini hava aðalorðaskifti, og tað hevur Løgtingið sett á dagssskránna týsdagin 10. februar.

## Toskur settur í kør

Ta seinastu vikuna hava menn hjá alifelagnum Faroe Cod Farm í Hvalba koyrt toskasmolt í kør, sum standa uppi á landi. Tilsamans er talan um 38.000 smolt. Í fyrsta umfari eru tey í einum kari, men tá tey verða eitt sindur størri, verður neyðugt at hava tey í tveimum kørum. Nú tey eru sett í karið, viga smoltini umleið 100 gram, men gongst sum ætlað, fer hvør fiskur at viga umleið átta pund um einar 14 mánaðir, skrivar Suðurrás.

# Rennibreytin liðug á ólavsøku



- Nýggja rennibreytin verður av besta slagi, sigur Heðin Mortensen
*Mynd: Jens Kr. Vang*

**Um slakar seks mánaðir verður nýggja rennibreytin í Havn liðug. Hon verður av sama slagi sum tey nýta í Íslandi. - Hesar hóska best til okkara veðurlag, sigur Heðin Mortensen, borgarstjóri.**

KOMMUNA
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

**Havn:** Í longri tíð hevur verið arbeitt við at útvega havnarborgarum eina veruliga rennibreyt.

Arbeiðið uppá hesa byrjaði í fjør, og í dag er meginparturin av spreingiarbeiðinum liðugt. Í næstum verður farið undir sjálva planeringina.

Tá hetta er gjørt, byrjar tað stóra takið við at fáa alt økið skipað til eina veruliga rennibreyt á høgum støði.

Ein partur av hesum arbeiði er sjálvt undirlagið, sum stór krøv verða sett til.

Í rennibreytini verða íalt átta geirar at renna á.

### Íblástur

Undirlagið til eina føroyska rennibreyt skal kunna tola eitt sindur av hvørjum.

Frá kommununar síðu hevur ein verið fult greiður um hetta, og tí hevur ein tikið við einum tilboði frá fyritøkuni POLYTAN um undirlag sum kostar góðar 3,6 mió kr.

- Vit hava kannað, hvat slag av undirlagi teir brúka á rennibreytum í grannalondum okkara – Hetlandi, Íslandi og í Noregi.

- Her hava teir nøkulunda sama veðurlag sum vit. Úr Íslandi fingu vit at vita, at hetta slagið av undirlagi var tað einasta sum var egnað hjá teimum, sigur borgarstjórin.

Slík undirløg hava langa leveringstíð, og tí varð neyðugt hjá býráðnum at samtykkja hetta á fundi, sum tey hildu í gjárkvøldið.

Sjálvur ímyndar borgarstjórin sær, at rennibreytin fer at verða nógv nýtt av fólki. Hon fer uttan iva eisini at verða til miklan íblástur fyri føroysk ítróttarfólk, ikki minst í ár nú Oyggjaleikir eru á skránni.

- Her fáa so føroysk ítróttarfólk ein møguleika at renna á og í góðum umstøðum og ikki minst á góðum undirlagi, bæði dag og nátt, sigur hann.

Umframt hetta fer rennibreytin at hava einar 80 parkeringsbásar. Og hesir fara eisini at lætta munandi um hjá teimum, sum ætla sær til okkurt tiltakið í Norðurlandahúsinum.

Ætlanin er at alt hetta arbeiðið skal verða liðugt á ólavsøku í ár.

# Poul vil úr formanssessinum

**- Eg havi sitið níggju ár sum formaður í grunninum. Nú haldi eg tað vera rættast, at onnur standa við stýrisvølin, sigur Poul Michelsen. Hann hevur sent býráðnum áheitan um at velja nýggjan formann fyri Tórsvøllargrunnin**

TÓRSVØLLUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Persónurin Poul Michelsen er uttan iva eitt av fremstu samleikatekinunum hjá Tórsvølli. Síðani hugskotið varð sett í kortið fyri skjótt nógvum árum síðani, hevur fyrrverandi borgarstjórin verið ein av ídnastu ígongdsetarunum. Og tí var tað væl ikki annað enn náttúrligt, at Poul varð valdur formaður, tá grunnurin formliga varð stovnsettur í 1998.

Síðani hevur Poul eisini verið formaður í grunninum, men nú heldur hann, at tíðin er komin, har onnur skulu taka við leiðsluni.

- Eg havi sent Tórshavnar Kommunu bræv, har eg biðið um at verða loystur úr formanssessinum. Fyrst og fremst, so er hetta ein avleiðing av, at tíðin hjá mær ikki røkkur, tá eg samstundis havi egna fyritøku. Men hartil, so er tíðin nú kanska tann rætta, um formaðurin skal skiftast. Sponsorsáttmálarnir, sum vórðu gjørdir, ganga út í ár, og skal ein nýggj leiðsla sita komandi árini, er helst eisini best, um sama nýggja leiðsla er við til at fáa hesar sáttmálar, sigur Poul Michelsen.

Og hann leggur afturat, at hann á ongan hátt fer at klamsa við hurðini, nú hann ætlar úr formanssessinum.

- Eg ynski framhaldandi Tórsvølli alt tað besta. Og eg vil fegin hjálpa til, um ein nýggj leiðsla ynskir hetta. Men eftir níggju ár sum formaður haldi eg, at onnur eiga at sleppa framat.




*Maðurin, sum øll árini hevur myndað Tórsvøll, hevur nú heitt á býráðið um at velja nýggjan formann í grunnin*

# Gravgangur eftir vinnuøkjum

**Kollafjørður:** Stórur eftirspurningur er eftir vinnuøkjum í Havn og í Kollafirði.

Hetta hevur kommunan tikið til eftirtektar, og fer í framtíðini at skipa eitt stórt vinnuøki innast í Kollafirði.

- Støðan er faktiskt hon, at vinnan skríggjar eftir økjum, sigur Heðin Mortensen, borgarstjóri í Havn.

Á býráðsfundi í gjárkvøldi var samtykt at broyta byggisamtyktina fyri innasta partin av fjørðinum í Kollafirði til eitt vinnuøki, ístaðin fyri eitt landbúnaðarøki.

Hetta økið er 82.000 fermetrar til støddar og her verður í framtíðini bert loyvt at byggja hús til vinnuvirkir, verksmiðjur, goymslur og virksemi í samband við ymiskar tænastur.

**sb.**

# Roykivirkið framvegis tómt

**Havn:** Ikki gongur altíð sum meirilutin ætlar.

Hetta varð staðfest á býráðsfundi í gjárkvøldið, tá málið um keyp av bygningunum hjá Roykivirkinum í Álakeri var til viðgerðar.

Ætlanin var at keypa hesar bygningarnar at nýta hjá ymiskum húsvillum frítíðarfeløgum í Havn fyri 7 mió kr. Men tá málið kom til atkvøðugreiðslu varð tað felt.

Endamálið við keypinum var at bjóða m.a. Bjargingarfelagnum, Froskmannafelagnum, MC-felagnum og Kajakkfelagnum eitt umhvørvi til felagsvirksemi.

Á fundinum í gjárkvøldið fekst ikki undirtøka fyri ætlanini, tí mett varð at vinnan sjálv átti at yvirtaka bygningarnar.

Bygningarnir hava staðið tómir í eini 6-7 ár, og líkt er til at tað koma teir at gera eina tíð aftrat.

**sb.**